


Hans Pauli Strøm:

## Lat grundlógarnevnd orða ta tjóðskaparligu semjuna

**Skal ein grundlóg skrivast fyri Føroyar mugu vit vita, hvørja stjórnarskipan hon skal vera grundlóg fyri. Annars rennur arbeiðið út í sandin. Tað heldur Hans Pauli Strøm, fyrrverandi limur í Grundlógarnevndini. Hann skýtir tískil upp, at grundlógarnevndin fær uppgávuna at finna ta breiðu semjuna, sum ongantíð fekst politiskt**

GRUNDLÓG
*Ingi Rasmussen*

Tá nýggja Grundlógarnevndin fer til verka eigur at vera skipað soleiðis fyri, at hon fær til uppgávu at orða eina semju í sjálvstýrismálinum.

Tað heldur Hans Pauli Strøm, skrivari í Javnaðarflokkinum. Hann var ein íðin luttakari í Grundlógarnevndini, sum sat síðsta valskeið. Men av tí at Hans Pauli Strøm fall á løgtingsvalinum í fjør, verður hann ikki partur av nýggju nevndini, tí hon er bara mannað við fólkavaldum politikarum og embætisfólkum.

Fyriskipararnir hava kortini bjóðað Hans Pauli Strøm at vera røðari á grundlógarráðstevnuni, sum í hesum døgum leikar á í Norðurlandahúsinum, netupp tí hann hevur sýnt evninum serligan áhuga.

### Nýggjan leist

Hans Pauli Strøm kennir sostatt væl til grundlógararbeiðið, sum gongur á fjórða árið. Og nú ein nýggj grundlógarnevnd skjótt fer til verka, vónar hann ikki, at hon heldur fram í sama sporinum sum tann undanfarna. Tí so er vandi fyri, at onki spyrst burturúr.

– Hví kom hin fyrra nevndin ikki til eitt úrslit av arbeiði sínum? Tí ongin greiða var um tær politisku fyritreytinar, tað vil siga tær stjórnarligu fyritreytirnar. Men skilið er framvegis tað sama. Politisku umstøðurnar eru broyttar, men bert so at stjórnarligu fyritreytirnar eru uppaftur ógreiðari enn hjá tí fyrru nevndini, sigur Hans Pauli Strøm.

Hann setir spurnartekn við, hvørja stjórnarskipan ein nýggj grundlóg skal vera fyri. Fyri einum heimastýri? Ella fyri fullveldi? Hvørki er semja um. Ella skal ein grundlóg orðast í einari ókendari framtíðarstøðu? Hans Pauli Strøm svarar sjálvur.

### At søkja semjuna

Grundlógarnevndin skal gerast staðið, har partarnir nærkast einari semju í tjóðskaparspurninginum.

– Eg skjóti upp, at grundlógarnevndin í staðin fyri at gerast eitt nýtt forum fyri tjóðskaparligum klandri, fær høvuðsuppgávuna at orða ta tjóðskaparligu semjuna. Latið grundlógarnevndina sjálva orða sín arbeiðssetning og broyta hann, so at uppgávan eisini verður at orða eitt uppskot til eitt statsrættarligt valdsbýti og eina stjórnarskipan, sum ein breið tjóðskaparlig semja kann fáast um, sigur Hans Pauli Strøm.

Uttan eina semju um, hvat fyri eina stjórnarskipan grundlógin skal vera grundlóg fyri, ber illa til at gera endaligar orðingar í grundlógina. At finna ta tjóðskaparligu semjuna um hetta, er tann veruliga uppgávan hjá Grundlógarnevndini, heldur Hans Pauli Strøm.

Møguleiki skuldi verið fyri, at veita rúmd fyri sjónarmiðinum hjá Hans Paula Strøm, tí landsstýrismaðurin við lógarmálum, Høgni Hoydal, hevur eftir tilmæli frá Javnaðarflokkinum orðað nýggja uppskotið soleiðis, at nevndin sjálv orðar arbeiðssetningin.

### Uppsøgn gjørlig

Vinnur uppskotið hjá Hans Paula Strøm frama, so er spurningurin sjálvandi, hvørja skipan føroyingar kunnu semjast um. Tí har hevur stóri knúturin verið higartil. Skal tað vera heimastýri, sjálvstýrilóg ella frælsur felagsskapur við Danmark er gjøgnumtaglað og tannlað síðstu árini.

Tí kann tað gerast avgerandi, heldur Hans Pauli Strøm, at grundlógin inniheldur eina greiða mannagongd, sum skal fylgjast, um vit seinni vilja fara úr hesari stjórnarskipan yvir í eina aðra. Ein uppsøgn skal vera gjørlig.

# Sjálvsavgerðarrættur er ongin jomfrú

*Chimene Keitner, altjóða serfrøðingur í sjálvsavgerðarrætti, skjeyt hol í prógrundirnar ímóti at velja skipanir, sum liggja millum verandi skipan og fullveldi. Sjálvsavgerðarrætturin kann ikki missast í allar tíðir, fyri tað um ein skipan verður vald nú*
*Mynd: Jens K. Vang*




**Sjálvsavgerðarrætturin hjá tjóðum er ikki ein moydómur, sum ongantíð kemur aftur, um hann er brúktur. Tað gjørdi Dr. Chimene Keitner greitt, tá hon legði síni sjónarmið fram á Grundlógarráðstevnuni. Eitt val um ríkisrættarligu støðuna er ikki endaligt, tí tað kann broytast seinni, sigur hon. Ein frælsur felagsskapur er ein góð fyrimynd hjá føroyingum, tí hann gevur víðfevndar møguleikar, uttan at nakað er spælt av hondum**

GRUNDLÓG
*Ingi Rasmussen*

Sjálvsavgerðarrætturin er ómissandi. Hann verður ikki uppbrúktur og harvið mistur, um føroyingar gera av at gera eina skipan, sum liggur onkustaðni ímillum fullveldi og verandi støðu. Tað sigur Dr. Chimene Keitner, sum fyrrapartin mikudagin helt áhugaverdan fyrilestur á stóru altjóða grundlógaráðstevnuni í Norðurlandahúsinum.

Tað er greitt, at føroyingar eru ein tjóð við sjálvsavgerðarrætti. Tað merkir, at føroyingar sjálvir kunnu gera av, hvørji ríkisrættarlig viðurskifti vit vilja hava. Um vit vilja hava fult sjálvstýri ella okkurt annað. Tað siga eisini allir politisku flokkarnir í Føroyum. Men síðstu árini hevur tað verið ein óloysiligur knútur, at ósemja er um, hvussu sjálvsavgerðarrætturin kann brúkast.

### Ómissandi rættur

Stóru samgonguflokkarnir hava síðan 1998 ført fram, at verður sjálvsavgerðarrætturin brúktur til eina skipan, har Føroyar onkursvegna eru partar av Danmark, so er vandi fyri, at hann er brúktur og kann ikki brúkast aftur. So eru Føroyar endaliga limaðar inn í Danmark. Tað var eisini út frá hesum sjónarmiði, at løgmaður avblásti fráboðaðu fólkaatkvøðuna, tí hann óttaðist útlitini.

Dr. Chimene Keitner vísir hesum aftur. Hon er serfrøðingur í altjóða løgfrøði við serligum atliti til tjóðskaparligan sjálvsavgerðarrætt. Hon hevur titlar frá Yale og Oxford, starvast í løtuni við Supreme Court of Canada og hevur eitt nú verið partur av grønlendsku sjálvstýristilgongdini.

Chimene Keitner greiðir frá, at tankin um, at sjálvsavgerðarrætturin bert kann brúkast einaferð, stavar frá 60-árunum, tá hjálond fingu høvi at velja millum samband og loysing frá yvirvaldinum. Men tann tankagongdin er ikki til longur.

– Um tit velja eina aðra skipan enn fullveldi, skulu tit bara gera greitt, at tit ikki hava spælt tykkum av við sjálvsavgerðarrættin. Hóast tit velja verandi støðu, skulu tit boða frá, at hetta er bert fyri nú. So leingi tað verður gjørt klárt, kann ongin koma aftur um aftur og siga, at tit hava valt. Sjálvsavgerðarrætturin má ikki trýsta tykkum til at taka eina avgerð nú, sum tit ikki eru búgvin til, sigur Chimene Keitner.

### Bluff-nummar

Samráðingarnar millum donsku stjórnina og landsstýri slitnaðu, tí danir ikki vildu viðurkenna føroyingar sum tjóð við sjálvsavgerðarrætti. Hvat nú, um danir føra konservativa sjónarmiðið fram móti føroyingum, at sjálvsavgerðarrætturin er brúktur, tá vit hava tikið eina støðu? spurdi Sosialurin Chimene Keitner.

– Hatta er eitt trupult øki, tí tað er ivasamt, hvat er loyvt sambært altjóða rætti. Hevur USA loyvi at bumba Irak, fyri at taka eitt ekstremt dømi. Tað er ein spurningur um umdømi. Um Danmark noktar at viðurkenna tykkara sjálvsavgerðarrætt undir samráðingum, so trúgvi eg, at tað er eitt bluff-nummar. Tað hevði skatt teirra umdømi almikið, og tit eiga ikki at góðtaka eitt slíkt sjónarmið. Tað týdningarmesta er, hvat tit sjálv vilja við tykkara landi, sigur Chimene Keitner.

### Nógvir møguleikar

Frælsur felagsskapur stóð ovast á skránni, tá fullveldissamgongan fór til samráðingar við Danmark í undanfarna valskeiði. Og tað er eisini hesa loysn, sum Chimene Keitner er talskvinna fyri. Hon vísir á, at ein frælsur felagsskapur letur upp fyri einari rúgvu av møguleikum, ið røkka líka frá sambandi til fullveldi.

Danska sjónarmið er, at valdið yvir Føroyum er latið føroyingum at umsita av dønum. Chimene Keitner mælir til at venda hetta á høvdið, tí valdið kemur frá føroyska fólkinum.

– Tit hava vald at ráða, og ein frælsur felagsskapur snýr seg um, hvat tit vilja lata dønum at ráða fyri tykkum, sigur hon.

Frælsur felagsskapur er ein áhugaverd loysn fyri føroyingar, staðfestir Chimene Keitner, sum tykist at hava sett seg væl inn í føroysk viðurskifti.

– Frælsur felagsskapur er áhugaverdur, tí tú kanst bæði vera ST-limaland og samstundis hava samband við ein størri stat. Tað gevur víðar møguleikar. Tað er heldur ikki neyðugt at gera alt av beinanvegin, tí tað er onki galið við at lata møguleikar standa opnar til aðrar tíðir, sigur Chimene Keitner.

Alt er kortini ein spurningur um samráðingar, viðgongur hon. Men hava føroyingar á einum breiðum grundarlagi gjørt sær sína støðu greiða, standa teir sterkir.

## Sjálvsavgerð er sjálvsøgd

**Serfrøðingar halda, at tíðin er farin frá kjakinum um, hvørt føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti. Kjakið eigur at snúgva seg um innihald**

SJÁLVSTÝRI
*Ingi Rasmussen*

Tað er ongin ivi um, at føroyingar eru tjóð við sjálvsavgerðarrætti.

Tað er greiða støðan á Grundlógaráðstevnuni, sum leikar í Norðurlandahúsinum.

Sagt verður annars, at samráðingarnar millum Føroyar og Danmark um fullveldi slitnaðu, tí danska stjórnin ikki vildi svara, um føroyingar eru tjóð við teimum altjóða rættindum, sum fylgja við. Men tað er ongin ivi um, sambært teimum altjóða serfrøðingum, ið vitja Føroyar.

Rætturin til sjálvsavgerð hevur verið nógv frammi í londum, sum hava kravt sjálvstýri. Men sambært Dr. Chimene Keitner hava føroyingar ein landafrøðiligan fyrimun.

– Føroyar eru leysar av øðrum geografiskt. Føroyingar eru eitt egið fólk, við egnum málið og mentan, so hatta er ein spurningur, sum tit eru komin forbí. Tit eiga heldur at kjakast um innihald. Hvat tit ætla at brúka tykkara sjálvavgerðarrætt til, sigur Chimene Keitner.

Íslendsku professararnir Sigurður Líndal og Eirikur Thomasson eru líka avgjørdir sum Dr. Keitner.

– Føroyingar eru eitt annað fólk enn tað danska og hava egið mál og egna mentan. Søguliga hava Føroyar verið serskilt land við rættindum, sum í ávísan mun hava verið óheft av danska ríkum. Sæð út frá hesum er ongin ivi um, at føroyingar hava tey rættindi, sum tjóðir hava til sjálvsavgerð, hóast teir eru undir donsku grundlógini, sigur Eirikur Thomasen, professari.

Sjálvsavgerðarrætturin snýr seg millum annað um, hvørt eitt fólk hevur rætt sjálvt at gera av, hvørja ríkisrættarliga støðu tað vil hava.